# Ein fyri framtíðina

**Ársins songrødd 2008, Anna Nygaard, sjarmerði seg beint inn í hjørtuni á áhoyrarunum tá hon, saman við bólki hennara, hevði eina frálíka konsert á Torginum**

SUMMARFESTIVALUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Fleiri av okkara fremstu songfuglum hava á sinni havt heitið Ársins Songrødd á sær, og undir framførsluni á Torginum við Annu Nygaard, kundi tú hóma enn ein songfugl á veg fram á føroyska tónleikapallinum.

Mótsatt fleiri av teimum ungu og nýggju sangarunum, syngur Anna Nygaard ikki sangir, ið eru serliga nemmir at syngja. Og hóast tað til tíðir var torført at hoyra hvat hon sang, serliga tá hon fór niður í teir djúpu tónarnar, vigar hennara aldur og torleikastigið á hesum slagi av sangum væl og virðiliga upp fyri hetta. Men tá hon so fer longri uppaftur á tónastiganum, eigur hon longu eina sera sterka rødd, og tað var júst henda røddin, ið sjarmeraði seg beint inn í hjartað.

Tað, at hon torir at fara í holt við at syngja jazz og motown, er eitt bragd í sær sjálvum. Føroyingar eiga ikki serliga nógvar av hesum sangarunum, og hetta er við til at gera júst hana til nakað serligt.

Tað merktist hóast alt, at hon ikki er von við at spæla saman við bólki, men hetta var als ikki nakað, ið darvaði framførsluni. Tónleikurin passaði sera væl til fjøldina, ið mundi telja okkurt um 200 áhoyrarar í øllum aldrum, og har var ein sera hugnaligur stemningur á Torginum, og satt at siga var bara at møta upp og njóta hesa stundina, meðan Ársins Songrødd bjóðaði tær alla ta sálarbót, tú hevði brúk fyri.

Um eg gekk við hatti, skuldi eg við virðing tikin hann av fyri hesum songfuglinum, sum er á veg fram á føroyska tónleikapallin.



*Orsøkirnar til at júst Anna Nygaard gjørdist Ársins Songrødd 2008 vóru sera eyðsýndar, tá hon, saman við bólki, framførdi á Summarfestivalinum*

## Eksperimentalt og avbjóðandi elektropopp frá The Ghost

Næstseinastir á pall á Summarfestivalinum 2008 vóru The Ghost. Við einum feitum ljós-, video-, og ljóðshowið og uppaftur feitari framførslu vóru Filip Jacobsen og Urbanus Olsen sera sannførandi. Hóast teir enn eru sera nýggir, hava rættiliga nógv fólk longu lagt merki til talentið í hesum bólkinum, og nú manglar bert at føroyingar eisini taka hetta slagið av tónleiki til sín.

rn



# The Dreams á dreymaferð

**The Dreams hava upp á heilt fá ár ment seg frá ungum, vónríkum bólki, til ein bólk, sum hévur vunnið sær bæði føroyskar og danskar lurtarar, og sum liva dreymalívið; stjørnulívið**

SUMMARFESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

The Dreams settu brakandi punktum fyri Summar Festivalin. Við eini brakandi framførslu, ið hevði við sær alt tað, ið vit kenna bólkin fyri. Kendu dondku løgini og føroysku endurinnspælingarnar og so orkumettaða framførslan.

Føroyskur popp-punkur, ið situr sum hann skal.

Stuttligt, at tað hevur eydnast ungu monnunum at halda fast við dreymin, og skapa sær eina yrkisleið millum stjørnur á tónleikahválvinum.

Bólkurin, sum lutók í donskum Grand Prix, hevur givið danska fløgu út, og sum fekk allar føroyingar at hoyra nakað annað í gomlum slagarum, var virðiligur endabrestur .

Stuttligt innslag var, at smádrongir komu á pall - klæddir eins og The Dreams - og leiktu við teimum.

Hóast veðrið byrjaði at hjálpa til við at seta punktum, so vóru The Dreams eitt virðiligt punktum á Summar Festivalinum.




*Føroyskur popp-punkur, ið situr sum hann skal*

# Tað riggaði væl

**Sølva & SALT drógu nógv fólk til sín, tá tey framførdu í tjaldinum seinnapartin leygardagur**

*Uni Holm Johannesen*
*unisosialurin.fo*

Hóast veðrið var av tí allar fægrasta hesa løtuna, so savnaði Sølva & SALT væl av fólki inni í tjaldrinum, tá hesi framførdu inni í tjaldinum. Tað riggaði væl, og sterka kvinnuliga røddin fann veruliga sítt pláss í sangunum.

Framførslan staðfesti, at tað er ein stórur bólkur, sum væl dámar hendan tónleikin. Klokkan var júst farin av fýra, tá tey trinu á pallin, og tað var væl hóskandi. Fólk sóu veruliga út til at hugna sær. Ein fín framførlsa hjá Sølva & SALT.



*Sølva framførdi saman við bólkinum SALT*